DAGSINS MEINING

Mistak rættað

So eydnaðist tað formanni Føroya Fiskimannafelags langt um leingi og eftir tógvi stríð at fáa TV 2 at rætta tey skeivu og beinleiðis ósonnu tíðindi, sum sjónvarpstøðin tíðliga í summar bar um inntøku- og skattaviðurskiftini hjá føroyskum fiskimonnum. So er hetta ódámliga mistak rættað, og tað skuldi bara mangla, kundu vit havt hug at lagt afturat.

At mistakið og skeivu tíðindini eru vorðin rættað, er bert formanninum Óla Jacobsen fyri at takka. Hann hevur við sínum treiskni og treysti áhaldandi og staðiliga kravt ósonnu tíðindini dementerað, og hetta eydnaðist so umsíðir. Skeivu tíðindini eru ein stór skomm fyri TV 2 og ikki minni er skommin, at tað skuldi taka so langa tíð at rætta mistakið og at greiða dønum frá rætta samanhanginum. Hvør annar uttan Óli hevði orkað at tikið stríðið upp við hesa máttmikla sjómvarpsstøð? Neyvan nakar. Lat tað tí verða sagt, at tað er sera gott fyri Føroyar, at tingini vórðu sett á teirra rætta pláss, og at danir fingu sannleikan at vita. Óli Jacobsen eigur tøkk uppiborna fyri, at hann tók upp hetta ótakksama stríðið.

Eftir stendur nú spurningurin, hvussu alt hetta kom upp. Hvussu ber tað til, at tað meira enn einaferð hevur verið negativt fokus sett á føroysk viðurskifti og serstakliga á blokkin og á inntøkuviðurskifti fiskimanna. Teir, sum skipaðu fyri tí eftirhondini herostratiskt gitnu ráðstevnuni á Christiansborg, tváa sær um hendurnar. Teir eru púra ósekir, siga teir. Tað er danska pressan, sum er ábyrgdarleys og reingir upplýsingar um Føroyar. Tað skerst ikki burt, at so er - tíverri! Men samstundis verður fórt fram, at skipað varð fyri ráðstevnuni fyri at kunna danska almenningn um grønlensk og føroysk búskaparviðurskifti. Henda kunning skuldi koma út frá ráðstevnuni. Hvussu skuldi kunningin koma út til danska almenningin? Jú, umvegis somu donsku pressuna, sum hevur til vana at reingja veruleikan og at gera ósannar søgur um Føroyar burturúr sakligari upplýsing. Her hongur ikki saman.

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Orða føroyskan politikk

Janus Hansen,
lívfrøðingur

Eg fegnist stórliga um, at Vinnumálaráðið nú hevur sett sær sum mál at orða ein føroyskan orku- og umhvørvispolitikk, og eg vóni, at tað fer at gangast væl. Fyritreytirnar eru fyri tí. Vit hava at kalla ongan orku- og umhvørvispolitikk, so tað er lagamanni at læra av tí, sum onnur hava gjørt, eisini feilunum, og síðan orða ein føroyskan politikk. At Vinnumálaráðið eisini fyriskiparar tiltøk við tí endamáli at birta uppundir alment kjak er ótrúliga gott.

Bjørn Lomborg

Eg gjørdist heldur kløkkur, tá ið eg sá, hvør var boðin higar av Vinnumálaráðinum. Júst sum Fiskimálaráðið hevur gjørt tað við Jón Kristjánsson, bjóðar Vinnumálaráðið einum pseudovísindamanni, í hesum føri Bjørn Lomborg, til at byrja kjakið um føroyska orku- og umhvørvispolitikkin. Alt gott um tað at birta uppundir eitt kjak og hava ein "devils advocate", hvørs orð ikki altið skulu takast fyri fult. Men eg eri stórliga bangin fyri, at Vinnumálaráðið og aðrir kunnu finna upp á at taka orðini hjá honum í fullum álvara.

Eg var til fyrilesturin hjá Bjørn Lomborg í Norðurlandahúsinum, og sum væntað dugdi maðurin sera væl at tosa og undirhalda. Men innihaldinum eigur ein at varða seg fyri.

Nógvur dentur varð lagdur á at greiða frá, at neyðugt er at prioritera rætt. Jú sjálvsagt skulu vit tað, men eg vóni, at politikarar duga at síggja, at tá ið ein føroyskur orku- og umhvørvispolitikkur skal orðast, so kunnu teir ikki seta seg at viga AIDS/HIV-trupulleikan ella altjóða samhandil ímóti føroyskum umhvørvispolitikki.

Eisini hevði hann grafar, sum vístu, at nærum alt var betri í dag enn tað var fyrr. Fólk arbeiða minni, liva longur, eru ríkari og dálka enntá minni. Niðurstøðan var m.a., at umhvørvið er ein vána íløga, og Kyoto-sáttmálin ein desperat royndur til at gera bara okkurt, sum í síðsta enda einans kostar pening og ongum endamálið tænir.

Men veruleikin er ein annar enn tann, sum Bjørn Lomborg teknar. Hann nýtur tøl og útsagnir, sum aðrir granskarar eru komnir fram til, men nógv hevur verið funnist at honum fyri einans at velja tey tøl og tær útsagnir, sum tekna júst ta mynd, sum hann ynskir. Við øðrum orðum, hann villeiðir fólk. Hetta var eisini orsøkin til, at Udvalgene Vedrørende Videnskabelig Uredelighed kolldømdi mannagongdirnar, sum vórðu nýttar í bók hansara, Verdens Sande Tilstand. Tó, Videnskabsministeriet kolldømdi hesa niðurstøðuna, m.a. tí at bókin ikki var ein vísindalig bók og tí kundi eingin krevja, at hon var vísindaliga reiðilig. Har endaði tað kjakið.

Lat meg bara staðfesta, at niðurstøðurnar hjá Bjørn Lomborg ikki eru vísindaliga grundaðar. Ein listi av villum í bókini eru at síggja á www.lomborg-errors.dk, og sum mótvekt til bókina hjá honum eiga fólk at lesa Sceptical Questions and Sustainable Answers, ið Det Økologiske Råd gav út. Var tað einans kjak, Vinnumálaráðið vildi hava, so valdu teir rættan mann. Men var tað at fáa eitt kjak til frama fyri ein góðan orku- og umhvørvispolitikk, so var hetta neyvan rætti maðurin.

Náttúru- og umhvørvispolitkkur

Nú valið fall á Bjørn Lomborg sum kjakbirtara, og hóast vit ikki kunnu brúka hansara talfimleik til nakað sum helst, so mundi endamálið hjá Vinnumálastýrinum kortini vera at skapa kjak um umhvørvispolitikk.

Lat tað vera sagt, at eg vóni at Vinnumálastýrið ætlar at taka tær umhvørvisábyrgdir á seg, sum tað eigur, og ikki gongur somu leið sum Marjus Dam, tá ið hann spurdi Bjørn Lomborg um "statistiske fiff" fyri at sleppa undan ov tungum byrðum av Kyoto-sáttmálanum. Vit mugu sum ábyrgdarfullur partur av heiminum taka á okkum tær ábyrgdir, sum fella okkum í lut og ikki snúgva okkum undan, har vit kunnu.

Skal ein orku- og umhvørvispolitikkurin orðast væl, so er tað neyðugt at samskipa hann við ein skilagóðan náttúrupolitikk. Náttúrupolitikkur er ein yviríspaður politikkur, ið byggir á eina vællýsta náttúru, har vit fólkaræðisliga hava tikið støðu til varðveitslu, rættindi og ábyrgdir. Síðan eiga lógir og kunngerðir at gerast sambært hesum. Neyðugt er eisini, at myndugleikarnir hava førleika, umstøður og møguleika til at tryggja, at hesar lógir verða hildnar.

Vit mugu skilja, at náttúrupolitikkur og umhvørvispolitikkur eru hvør sítt. Náttúrupolitikkur er fyrst og fremst ein spurningur um at varðveita náttúru. Umhvørvispolitikkur er í stóran mun ein spurningur um at regulera tey árin, sum standast av menniskjaligum virksemi, ikki bara til frama fyri náttúruna, men eisini fyri menniskju og fyritøkur.

Eingin politiskur vilji

Hóast politiskir flokkar í nógv ár hava skrivað føgur orð um náttúru okkara, so eru vit rættiliga fjart frá at hava ein veruligan náttúrupolitikk. Gott nokk er tað áskoðanir hava ávirkað vindmylluverkætlanina [...]". Sjálvsagt verður alt subjektivt, sum hevur við náttúruna at gera. Vit hava ongan politikk á økinum, og eiheldur nakran stovn ella myndugleika, sum fara óheftir inn í tilík mál.

Hitt dømið er tyrvingarplássið hjá Landsverkið við Oyggjarvegin. Í tí málinum hevur Landsverk fórt fram, at tilfarið (sum er runnið út um lendið og liggur sum eitt lag í ánni allan vegin oman á Signabø) ikki er skaðiligt fyri náttúruna, tí hetta er natúrligt tilfar. Tað sigur seg sjálvt, at náttúran á hesum økinum verður ávirkað. Men uppáhaldið um, at hetta ikki er skaði-

Framhald á síðu 11

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Figgjarleiðari: Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Hjørdis Gregersen hjordis@sosialurin.fo

Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Heini í Skorini heini@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Hans Kárason Mikkelsen
hans@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Myndamenn:
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Sosialurin í Suðuroy:
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
Sosialurin í Eysturoy:
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo
Sosialurin í Vágum:
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin
Avgreiðsla:
Mán.-fri. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-friggjadag klokkan 14[00]

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framihjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

VIÐMERKINGAR

Landsstýrismaðurin ov varin í tilmælinum um fiskidagar

Heidi Petersen
Framsøgukvinna Tjóðveldisfloksins í fiskivinnumálum

Tjóðveldisflokkurin mælir til 3% niðurskurð á landgrunninum og 25% á Føroya Banka.

Landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum mælir til ein niðurskurð í dagatalinum uppá 1,5%. Hetta er eftir Tjóðveldisfloksins tykki í so varisligt farið fram, og skal eg koma nærri inn á seinni, hví so er.

Hyggja vit eftir tilmælinum frá Fiskirannsóknarstovuni og fiskidaganevndini, so er semja um, at toskastovnurin er verri fyri og í minking sammet við undanfarnu ár, meðan hýsa og upsi eru omanfyri miðal.

Tó er ikki semja um, hvørji tiltøk eiga at setast í verk til tess at gera tað, sum menniskju kunna gera fyri at verja toskastovnin. Fiskirannsóknarstovan mælir til álvarslig inntriv í veiðuna eftir toski galdandi í eini 3 - 5 ár við eitt nú at minka dagatalið hjá húkaflotanum niður í eina helvt, ella at minka veiðuna við 25 % saman við fleiri friðingum á innaru leiðunum. Teir nevna, at t.d. kundu leiðirnar innanfyri 4 fjórðingar verið friðaðar fyri allan vinnuligan fiskiskap, og línuskipini ikki sloppið at fiska innanfyri 8 fjórðingar.

Hetta sum eitt serligt átak í hetta avmarkaða tíðarskeiðið, fyri at tað ikki skal verða vegna ovurfisking, at toskastovnurin kemur niður aftur á støðið, sum vit kenna frá 1991 og 1992, sum toskastovnurin kemur á av náttúrligum orsøkum. So kunnu vit bert vóna tað besta og ynskja sjálvsagt, at gróðurin í ár fer at gera mun hjá toskastovninum á landgrunninum, so hann mennist skjótt aftur.

Eisini mælir Fiskirannsóknarstovan til at skerja dagatalið í beinleiðis upsaveiðuni við 25% grundað á, at upsin hevur verið smáur seinastu árini.

Hinumegin mælir fiskidaganevndin ikki til nakra skerjing í fiskidagatalinum, tí, sum teir føra fram, er fiskidagaskipanin ein langtíðar javnvágarskipan, har hvørki skal regulerast upp ella niður.

Endurskoðan av fiskidagaskipanini

Tó mælir fiskidaganevndin til eisini at endurskoða alla lógina um vinnuligan fiskiskap, so hon gerst greiðari at virka undir og umsita.

Eisini mæla fiskidaganevndin og Fiskirannsóknarstovan til, at allur fiskiskapur á landgrunninum verður skipaður undir lógini um vinnuligan fiskiskap, tvs. at bólkur 1 - djúpvatnstrolarar og bólkur 6 - garnaskipinin koma inn undir skipanina við fiskidøgum. Fundur hevur verið við umboð fyri hesar bólkar, og var niðurstøðan, at teir ikki høvdu nakað ímóti at koma undir somu skipan, sum hinir skipabólkarnir - tó undir nøktandi treytum, sum ikki eru lýstar nærri.

Tað triðja, sum fiskidaganevndin mælir til, er at taka teir minstu bátarnar - ella frítíðarfiskararnar - sum eru í bólki 5, burtur úr skipanini undir vinniligum fiskiskapi og lata teir hava sína egnu skipan. Hetta fyri at spara umsiting, tí í hesum bólki vóru í fjør um 1000 bátar, og teir, sum róku vinnuligan fiskiskap, vóru uml. 180.

Fiskidagamarknaður

Eitt sera áhugavert tilmæli frá fiskidaganevndini er tilmælið um fiskidagamarknað. Her verður dentur lagdur á at fáa eina marknaðarskipan at galda á økinum, sum við grundarlagi í opinleika og kunnleika ger tað møguligt at fylgja við, hvør hevur fiskiloyvini og hvør nýtir fiskidagarnar, sum eru tillutaðir.

Tað seinasta, fiskidaganevndin ger vart við, er, hvussu ógvusliga stór økingin í veiðitrýstinum á Føroya Banka hevur verið. Bankaloyvi hjá bátum í bólki 4 - útróðrarbátum, sum royna við húki, eru umsett til skip í bólki 4, sum hava støddina til bólk 3, men ikki eru har, tí hetta eru samanløgd loyvi frá útróðrarbátum í bólki 4. Soleiðis eru smærri útróðrarbátar vorðnir til línuskip yvir 110 tons. Nevndin mælir til at skerja dagatalið við 10 %, umframt at friða bankan í gýtingartíðini.

Fiskirannsóknarstovan mælir til, at fiskidagatalið á Føroya Banka verður miðaltalið av nýttum fiskidøgum fyri árini 1996 - 2002.

Kvotaskipanin spædli endaliga fallit.

Hyggja vit nú eftir gongdini í fiskiflotanum síðani 1994, tá lógin um vinnuligan fiskiskap kom í gildi, er lætt at fáa eyga á ógvusligar broytingar.

Í 1994 varð ein donsk kreppuloysn við kvotaskipan smoygd yvir okkum, sum føroysku politikkararnir ikki høvdu vilja, ella møguleika at arbeiða ímóti. Ein skipan, sum føroyska vinnan frá degi eitt ikki vildi vita av. Fiskiflotin var nógv minkaður vegna figgjarkreppu, og fiskiskapurin hevði verið í botni fleiri ár á rað og kvinkaði júst uppeftir. Vinnan gjørdi vart við, at hon var harðliga ímóti at innføra eina skipan, sum um allan heim, har hon hevði verið nýtt, hevði spælt fullkomiliga fallit. Kvotaskipanir høvdu allastaðni elvt til óreglusemi á øllum økjum. Fiskur var blakaður fyri borð, fiskur veiddur einastaðni varð sagdur at verða fingin aðrastaðni, fiskasløg broyttu hvønn dag navn, frá tey vóru fiskað, til tey komu uppá land, o.s.fr.

Ikki var gjørligt at hava yvirlit yvir fylgjurnar av eini kvotaskipan. Tilfeingið fór til spillis, tíð og orka varð nýtt til at sleppa uttan um lógina, veiðihagtøl fóru á glið, og stovnsmetingarnar høvdu ongan møgusum mest burturúr havinum, um figgjarfrøðingarnir málbóru seg. So lítla íløgu sum gjørligt fyri at fiska mest møguligt vi besta lønsemi. Ein einføld figgjarlig fyrimynd, sum ikki einsamøll lýsir veruleikan, men kann vera ein vegleiðing til polittikaran.

Fiskifrøðingarnir hinvegin sita við tí ómøguliga setningi frá polittikarunum at spáa um framtíðina. Teir kannað og greina fortíðina, og kunnu út frá tí geva ábendingar um framtíðina - rímiliga vist - og um tey viðurskifti, teir hava við í útrokningunum, halda stikk. Aftur her verður tað ein einføld fyrimynd, sum ikki svarar til fulnar til veruleikan, men kann vera ein vegleiðing til politikaran.

Triðja sjónarmiðið kom frá einum sera áhugaverdum 77 ára gomlum fiskimanni og skribenti úr Ísrael, Menakem Ben-Yami. Hann fordi fram, at tá politikkararnir seta skipanir í verk, er tað týdningarmesta atlitið at taka, at skipanin fær undirtøku frá teimum þørtum, sum hon umfatar. Tað vil siga, at teir fiskimenn, sum skulu virka í skipanini, virða hana, tí gert tú eina skipan, sum ikki verður góðtikin, finnur fiskimaðurin altíð upp á ráð, hvussu hann kann sleppa uttan um skipanina. Vit kenna orðatakið her hjá okkum: "sjómaður er ongantíð ráðaleysur" og hugsi eg, at tað var hetta, gamli Ben-Yami eisini hevði sannað. Hann vísti annars eisini á, hvussu vandamikið tað er at fiska stovnar so langt niður, at bara smáur fiskur er eftir. Tá er lætt at oyða stovnin av tí, at gítingarstovnurin gerst ov lítil. Og so vísti hann til "toskin í Canada", ið hvarv, men tað vóru kanska fleiri orsøkir til tað - millum annað hitin í sjónum o.s.fr.

Eisini vísti Menakem Ben-Yami á, at politikararnir høvdu geografisk atlit at taka, tá skipanir fyri fiskiskap skulu gerast. Við øðrum orðum verður ein noyddur at taka útgangsstøði í búsetingarmynstrinum kring landið, tá eitt nú fiskirættindi verða lata, soleiðis at eitt øki ikki verður avtoftað, tí livigrundarlagið hjá fólkinum, har býr, verður tikið/selt/latið aðrar vegir.

Fyri at venda aftur til fiskidagaskipanina, so var hon innførd í lógina um vinnuligan fiskiskap í 1996 eftir sera hørðum trýsti frá eini samdari vinnu, og kvotaskipanin varð slept fyri ongantíð at koma aftur. Át bankarnir, fiskifrøðingarnir og fiskivinnan góðtaka okkara fiskidagaskipan er júst styrkin við henni, og tí skulu vit fara um hana við varsemi og ansa eftir, at vit ikki máa støðið undir skipanini burtur.

Eitt av grundsjónarmiðunum, tá lógin um vinnuligan fiskiskap var sett í gildi, var varðveiting av einum fjølbroyttum fiskiflota, men vit síggja í dag, at gongdin hevur ikki verið so, sum ætlað. Ein orsøk er, at fiskidagaskipanin ikki hevur verið nóg greið, og av tí hevur borið til at umsitið lógina rættiliga tilvildarligt. Smærru útróðrarbátarnir í bólki 4 eru lagdir saman og eru vorðnir til stór línuskip yvir 110 tons. Hetta var ongantíð ætlanin við lógini, og hevur hetta økt sera nógv um royndina av millum øðrum toski bæði á landgrunninum og á Bankanum.

Við støði í øllum hesum mælir Tjóðveldisflokkurin til at:

- fiskidagarnir á landgrunninum verða skerdir við 3 % fyri fiskiárið 2004/-2005
- fiskidagarnir á Føroya Banka verða skerdir við 25 %, og Bankin verður friðaður í gýtingartíðini
- at skott verður millum allar bólkar í skipanini, so tað í framtíðini verður púra greitt, at ikki ber til at leggja tvey útróðrarloyvi saman fyri at fáa eitt stórt línuskip yvir 110 tons í staðin. Eg meti hetta hava verið ein tann størsta trupulleikan við fiskidagaskipanini, ið hevur økt órímiliga nógv um veiðitrýstið
- øll lógin um vinnuligan fiskiskap verður endurskoðað og greið at seta í gildi til næsta fiskiár, tvs. 2005/-2006
- tá tilmæli og metingar verða gjørdar fyri føroyskan fiskiskap, eigur búskaparligi parturin eisini at vera við, tvs. siga, at vit saman við tí livfrøðiligu metingini og metingini frá vinnuni eisini fáa nakrar búskaparligar metingar
- umframt hetta verða friðingartiltøk sett í verk fyri toskin á innaru landleiðunum
- bólkur 1 og bólkur 6, sum eru djúpvatnstrolarar og garnaskip, verða umfataðir av lógini um vinnuligan fiskiskap, soleiðis at øll veiða eftir botnfiski á føroyska landgrunninum verður skipað undir somu treytum, og ongin skal kunna hava hjáveiðikvotu sum í løtuni
- frítíðarfiskararnir í bólki 5 verða tiknir úr skipanin, og bert teir útróðrarbátarnir, sum reka vinnuligan fiskiskap, verða eftir - hetta fyri at spara umsiting
- Mælt verður eisini til at taka táttin upp við einum fiskidaga- og loyvisbanka. Saman við vinnuni verður funnið fram til, hvussu hetta verður skipað, og eg taki undir við uppskotinum frá vinnuni sum ein ein byrjan at skapa gjøgnumskygni, so at tað gerst møguligt at fylgja við, hvør hevur loyvini, og hvussu nógvir dagar verða nýttir. Hetta eigur so at verða bygt út soleiðis, at øll hava atgongd til ónýttar dagar.
- Spekulatiónin við fiskiloyvum verður steðgað. Sjálvandi skal bera til at flyta loyvir, um ein endurnýggjar ella leggur saman, men alt annað eigur ikki at kunna bera til.
- Afturat hesu mæla vit til, at 100 mió. kr. verða nýttar til fiskivinnugransking og menning av fiskivinnuni á sjógvi og landi. Hetta umfatar allar tættir í vinnuni - bæði útbúgving av fólki, biotøkni, fiskivinnutøkni, KT, vørumenning og marknaðarkanningar, fyri at nevna nakrar lutir, sum skjøtil má setast á sum skjótast, um vit skulu gera okkum vónir um ein dag at vera heimsins fremsta fiskivinnutjóð, sum sjálvandi er okkara málsetningur.

Framhald av síðu 10

ligt, fær loyvi at standa, tí eingin er at taka sær av tílíkum málum.

Tað finnast óteljandi tílík dømi, men higartil hevur politiski viljin til at umsita náttúruna forsvarligt ikki verið til staðar. Vit hava ongan stovn ella myndugleika, sum kannar, hvørja ávirkan inntriv hava á náttúruna, hóast vit hava bæði fólk og stovnar her á landið við nóg góðum førleika til at gera hesar kanningar.

Nú Vinnumálaráðið hevur sett sær fyri at orða ein orku- og umhvørvispolitikk, eigur Innlendismálaráðið at nýta høvið til at orða ein náttúrupolitikk. Síðan kunnu vit bara vóna, at ráðini bæði megna at samskipa hesar uppgávur, so at vit kunnu fáa ein vælvirkandi orku-, umhvørvis- og náttúrupolitikk.